# Skopuningar til handils í nýggjum handilsdepli

**Fyrst í komandi ári kunnu skopuningar fara til handils í einum nýggjum matvøruhandli. Hann verður partur av einum handilsdepli, sum liggur væl fyri í bygdini. - Nei, her var vorðið alt ov trongligt. Tað var tørvur á størri hølum!, sigur eigarin, Sámal Hanne Lognberg**

HANDIL
*Snorri Brend*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Gamli handilin er bygdur út í mark, og tí er ikki gjørligt at fremja nakrar útbyggingar. Øðrvísi verður í vár, tá tann nýggi og munandi størri handilin letur upp aðrastaðni í bygdini*

**Skopun:** Tað kann tykjast sum eitt stórt stig at ein lítil matvøruhandil í eini lítlari bygd ætlar sær at byggja sær nýggj og størri handilshøli.

Men fyri Sámal Hanne Lognberg í Skopun er hetta eitt stig, sum hann metir vera neyðugt.

- Støðan er tann, at kundin krevur nakað av okkum í dag: Hann krevur, at vit hava størri úrval og góð og rúmlig hølir.

- Og tí fara vit við góðum treysti undir hesa ætlanina fyri at veita kundum okkara eina betri tænastu, sigur hann við Sosialin.

Útgravingin er liðug, um stutta tíð verður farið undir at stoypa og í desember mánaði kemur stálkonstruksjónin. Tá komið er út í februar ella mars mánað komandi ár er ætlanin at tann nýggi og 450 fermetrar stóri handilsdepilin skal lata upp.

- Einaferð hugsaðu vit um at fáa jólasøluna við í nýggja handilin. Men tá vit so avgjørdu at víðka um hølið, sóu vit skjótt, at tað bar ikki til á hesum sinni, sigur Sámal Hanne Lognberg.

### Víðka tænastuna

Sámal Hanne og konan Krista yvirtóku handilin "Hjá Herman", ein handil sum hevur nógv ár á baki í Skopun.

Tey sóu skjótt, at í verandi handilshølum bar illa til at fremja nakrar broytingar ella víðkan, av teirri einfaldu orsøk at her var snøgt sagt bygt út í mark.

Hugsanin um at byggja nýggj handilshøli kom so við og við fram, og síðani varð sett út í kortið.

Í fyrsta umfari var bert hugsað um teirra egna handil, men tað vísti seg kortini at onnur vóru áhugað at leiga høli frá teimum.

So í teim nýggju handilshølunum – hesi mini-handilsmiðstøðini í Skopun – fer í framtíðini at verða ein stórur matvøruhandil, ein frisørsalong og ein klæðnahandil.

Á henda hátt kunnu kundarnir fáa størri og betri tænastu – og tað alt á einum og sama staði.

### Góð plasering

Nýggi matvøruhandilin í Skopun fer at verða munandi størri enn tann, sum skopuningar higartil hava verið vanir við.

Í verandi handli hava tey húsast í umleið 60 fermetrum, men í nýggju handilshølunum eru 270 fermetrar avsettar til handilin. Íalt verður nýggja høllin 450 fermetrar.

Plaseringin av handlinum verður mett at vera sera væl vald. Hann liggur í útkantinum av bygdini, beint við høvuðsvegin og er tí lætt atkomuligur hjá skopuningum og øðrum fólki í oynni.

- Tað er ein tørvur á slíkum handli her á Sandoynni. Nú vilja vit so uppfylla henda tørvin, sigur ein vónríkur Sámal Hanne Lognberg.

---

# So byrjar FAROEXPO

**Seinnapartin í dag verða fyrstu almennu fyrilestrarnir í stóru, altjóða vinnustevnuni, sum verður í Runavík**

VINNUSTEVNA
*Snorri Brend*

**Runavík:** Leingi hevur verið sæð fram til hesa stóru og áhugaverdu stevnuna, sum nú byrjar í Runavík.

Umframt ta stóru vinnustevnuna sum er ætlað føroyskum og útlendskum fyritøkum, so fær almenningurin eisini at merkja hetta stóra tiltakið.

Ein partur av tiltakinum er tann stóra mentanarstevnan, sum longu er byrjað, og hin parturin eru teir almennu fyrilestrarnir, sum verða hildnir í samkomubygninginum hjá Kelduni í Skálafirði.

### Uppkeyp

Longu leygardagin byrjaði sjálv mentanarvikan við sjónleiki. Sunnudagin varð hildið áfram við framsýningum og sjónleiki.

Men í dag byrjar so vinnustevnan við trimum áhugaverdum fyrilestrum í Kelduni.

Fyrsti fyrilesturin verður við Birgiri Nielsen, sum arbeiðir sum búskaparfrøðingur á Vinnudeildini í Føroya Sparikassa. Fyrilesturin kallar hann "Fíggjarligar tænastur til útflutningsfyritøkur".

Síðani tosar Selinda í Heiðunum, tryggingarráðgevi hjá Tryggingarfelagnum Føroyar um útflutningstrygging.

At enda tosar íslendingurin Tórður Pálsson, stjóri á Greiningardeildini hjá Kaupthing Bank Island um eitt áhugavert evni, serliga fyri føroyingar. Fyrilesturin kallar hann "Strategiskur vøkstur gjøgnum uppkeyp".

Í morgin verða eisini fleiri áhugaverdir fyrilestrar, samstundis sum føroyingar og útlendingar bjóða hvørjum øðrum tænastur á vinnustevnuni.

# Sleppa at bowla í vikuni

**Arbeiðið við teirri næstu bowlinghøllini í landinum er nú komið rættiliga væl áleiðis. Ein av fyrstu døgunum sleppur almenningurin at royna seg av álvara**

BOWLING
*Snorri Brend*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Tær eru klárar at royna breytirnar í Bowlinghøllini í Leirvík - vm. Esther Mari og Eyðvør Olsen*

**Leirvík:** Teir hava arbeitt av øllum alvi fyri at fáa hesa høllina lidna, og leygardagin var so dagurin, tá fólk fingu høvið at síggja hesa útgerðina.

Enn er høllin ikki latin alment upp. Men sum skilst á stjóranum, Ólavi Olsen so verður hetta ein av fyrstu døgunum.

Í gjár kom ein maður úr Svøríki til Leirvíkar at hyggja eftir øllum. Ætlanin er nú at royna breytirnar, meðan hann er her, soleiðis at møguligar villur kunnu rættast beinanvegin.

Leygardagin var annars opið hús í bowlinghøllini í Leirvík. Og tað er ikki frítt, at áhugin fyri høllini er øgiliga stórur.

Væl omanfyri 200 fólk vóru í høllini henda dagin, og sum skilst komu tey mangastaðni frá: Har vóru sjálvandi flest vitjandi úr Leirvík, men bæði norðoyingar, fuglfirðingar, skálafólk og gøtufólk sóust eisini millum tey vitjandi.

Á skránni var ein lættur biti, og tá klokkan var um seks, fóru fólk á tær seks breytirnar fyri at vísa teimum áhugaðu, hvussu ein røtt bowlinghøll eigur at rigga.

Mong munnu helst gleða seg til løtuna, tá dyrnar verða alment latnar upp.